# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Thorstein Johannsen 70 ár



11. desember heldur Thorstein Johannesen, trúboðari, sín 70 ár føðingardag. Hann var føddur 18. desember 1934 í Hvalvík, sonur Jacob og Ivu fødd Iversen. Systkini eru: Hans Jacob, Thorstein, Lena og Birgir.

Thorstein er eitt kent andlit í Kirkjuligu Heimamissiónini í Føroyum. Hann hevur vinir og kenningar um alt landið.

Ungur gjørdist Thorstein blindur. Fekk ólekiliga eygnasjúku, sum broytti lív hansara. Eyguni hevði hann ring heilt frá beinbeini, so sjónin hevur altíð bilað honum.

Hevur Thorstein ikki kunna gletst um sólarljósið, hevur annað ljós lýst fyri honum: Ljósið frá honum, sum føddur varð jólanátt.

Frá barn og ungdómi av hoyrdi Thorstein gleðiboðskapin boðaðan í Hvalvík. Konfirmatiónsfyrireikingin hevði stóran týdning fyri hann. Frið við sín Gud fekk hann seinri við orðinum hjá Mika 7,8: "Tó at eg siti í myrkri, lýsir Harrin fyri mær." Hesi orðini "fyri mær" gjørdust honum kær, og ynskti hann eisini, at onnur fingu sálareyguni upplatin fyri tí frelsu, sum Gud hevur tilbúgvið øllum menniskjum.

Um Thorstein var blindur, vildi hann ikki bara sita hendur í favn.

Hann lærdi til bustbindara, og hevði egið virki.

Í 1960 fór hann á víðkaða háskúlan í Haslev í Danmark. Í 1962 kom hann í starv sum ferðatrúboðari hjá Indre Missión í Danmark.

Sum ferðatrúboðari hevur Thorstein ferðast um alt Danmark, og ofta hevur hann verið í Føroyum og boðða gleðiboðskapin í missónshúsum um landið.

Hesin ídni og vinsæli Harrans tænari hevur givið mongum føroyingi troyst og góð minni.

Í 1963 giftist Thorstein Kirsten og eiga tey dóttrina Evu.

Vinir og kenningar ynskja føðingardagsbarnum hjartaliga tillukku við tøkk fyri alt.

Føðingardagurin verður hildin í Meinigheitshúsinum í Havn leygardagin 11. desember kl. 19.00. Øll eru vælkomin.

Føroya Sparikassi:

## 75.000 krónur í gávu til Krabbameinsfelagið

**"Vit kunnu øll fáa brúk fyri tí stóra og góða arbeiði, ið Krabbameinsfelagið ger", sigur Bjarni Olsen, stjóri í Føroya Sparikassa í sambandi við, at gávugrunnurin hjá Sparikassanum hevur avgjørt at lata Føroya felag móti krabbameini 75.000 krónur**

### GÁVA

Ein fjórðingsøld er liðin, síðani "Føroya felag móti krabbameini" varð sett á stovn, og tað er ein tilburður, ið gávurgrunnurin hjá Sparikassanum heldur vera verdan at leggja til merkis. Í sambandi við stovning-ardagin hevur gávugrunnurin gjørt av at geva felagnum 75.000 krónur í gávu.

Gávan varð handað formanni felagsins, Jákupi N. Olsen, á stjórnarskrivstovuni í høvuðssætinum Yviri við Strond í Havn seinnapartin hósdagin.

Tað var sparikassastjórin, Bjarni Olsen, ið lat Jákupi N. Olsen gávukekkin, og í tí sambandi segði stjórin m.a.: "Tað eru nógv, ið vera rakt av krabbamein í okkara tíð, og sjúkan dregur ein myrkan skugga eftir seg kring allan heim, men vit kunnu eisini gleðast um at tað eru nógv, ið vera grødd. Vit vita tað, og hagtølini vísa eisini, at vit í Føroyum ikki sleppa undan hesi sótt. Tí er veruliga brúk fyri "Føroya felag móti krabbameini", og veruleikin er, at vit kunnu øll fáa brúk fyri tí stóra og góða arbeiði, ið felagið ger. Tað hevur stóran týdning, at krabbameinsrakt og teirra avvarðandi fáa ráðgeving, hjálp og stuðul, og tað er í hesum ljósi, at gávugrunnur Sparikassans stuðlar Føroya felag móti krabbameini við 75.000 krónum".

Jákup N. Olsen takkaði fyri peningagávuna og fyri álitið, ið Sparikassin hevur á felagnum. "Føroya felag móti krabbameini" hevur umleið 1500 limir, bæði aktivar limir og stuðlar. Felagið er eisini við í norðurlendskum og evropeiskum samstarvi.

38 fólk eru knýtt at felagnum, og ein ráðgevandi sjúkrarøktrafrøðingur er í føstum starvi.




*Formaðurin í "Føroya felag móti krabbameini", Jákup N. Olsen, fær gávukekkin handaðan frá Bjarna Olsen, sparikassastjóra*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Hárfríðkan við Gøtugjógv

Hósdagin 2. desember lat nýggja frisørsalongin "Hárfríðkan" upp við Gøtugjógv. Tað eru tey bæði Maria Skoradal úr Norðragøtu og Kartin Høgnesen úr Leirvík, sum eiga og reka salongina.

Tey hava bæði fyrr havt hvør sína frisørsalong í ávikavist Norðragøtu og Leirvík.

Umframt alt vanligt frisørarbeiði sum at klippa, lita og permanenta hár, sveisa tey eisini hár upp í og flætta. Eisini er ætlanin at pierca.

Fram til jólar hevur Hárfríðkan opið hvønn dag uttan sunnudag. Opið er soleiðis: mánadag-hósdag frá 10-17.30, fríggjadag frá kl. 10-19.00, og leygardag frá kl. 10-14.

Hárfríðkan
Tel. 44 10 88
FO- 511 Gøtugjógv



*Maria Skoradal og Kartin Høgnesen eiga og reka Hárfríðkan við Gøtugjógv*
*Mynd: Jonhard Hammer*